Útnorðursamstarvið útbygt

TÍÐINDASKRIV
Løgmansskrivstovan

Landsstýrið, íslendska stjórnin, grønlendska landsstýrið og Útnorðurráðið hava gjørt samstarvsyvirlýsing.

Yvirlýsingin varð undirskrivað í sambandi við ráðstevnuna hjá Norðurlandaráðnum um demokrati, sum í hesum døgum er í Reykjavík.

Samstarvsyvirlýsingin er eitt týdningarmikið stig fram móti at fáa samstarvið millum ráðið og myndugleikarnar í teimum trimum londunum í tryggar formligar karmar.

Tað vóru norðurlendsku samstarvsráðharrarnir, sum skrivaðu undir yvirlýsingina, Siv Friðleifsdóttir vegna Ísland, Lise Lennert vegna Grønland, og Høgni Hoydal vegna Føroyar, meðan Hjálmar Árnason, sum er formaður í Útnorðurráðnum, skrivaðiundir vegna Útnorðurráðið. Næstformaðurin í Útnorðurráðnum, Jógvan Durhuus, tók somuleiðis lut í hátíðarhaldinum.

Samstarvsyvirlýsingin staðfestir millum annað, at samstarvið millum íslendsku stjórnina, føroyska og grønlendska landsstýrið og Útnorðurráðið skal verða framt við at partanir skifta upplýsingar sínámillum á árligum fundi í sambandi við tingsetu Norðurlandaráðsins.

Eisini skulu norðurlendsku samstarvsráðharrarnir, í tann mun tað ber til, taka lut í ársfundinum hjá Útnorðurráðnum, og avvarðandi ráðharrar og landsstýrismenn skulu somuleiðis taka lut í evnisráðstevnunum hjá Ráðnum.

Harumframt skulu norðurlendsku samstarvsráðharrarnir hvørt ár lata Ráðnum frágreiðing um, hvat londini hava gjørt í mun til tilmælini hjá Ráðnum, og um samstarvið landanna millum.

Tingmannaráð Útnorðurs er samstarvsráðið hjá Føroya Løgtingi, grønlendska Landstinginum, og íslendska Altinginum. Tað varð stovnað í Nuuk í Grønlandi í 1985.

Á aðalfundi í 1997 broytti ráðið navn til Útnorðurráðið.

Átjan tingmenn, 6 úr hvørjum landi, sita í ráðnum.

Útnorðurráðið hevur gjørt samtyktir um ymisk mál, so sum umhvørvis- og tilfeingismál, styrkt mentanarligt samstarv landanna millum, skúla- og ítróttarsamvinnu og mangt annað.

Samtyktir Útnorðurráðsins verða lagdar fram sum uppskot til samtyktar á Løgtingi, sigur Løgmansskrivstovan í tíðindaskrivi.

Tøkk

artali a takka vit llum sum s ndu samkenslu
t ið k ri i ver i abbi o lan abbi okkara

Adolf Olsen

andaðist o varð arðaður

artans t kk til eima l ir o til tykkum
andss kra sinum sum v ru um ann
tað seinastu tíðina

kk til rest o tykkum sum l tu til
við arðarferðini

akk fyri bl mur o kransar o t kk til ll sum
fyl du onum til ansara seinasta víldarstað

So kann eg trygt til hvíldar fara nú
og vita, tú ert vinur mín tann besti;
og aldri, aldri skiljast eg og tú,
tín hond so væl um mínar hendur festi.

Vegna familjuna
Marjun

Heilsuverkið aftur á føtur

Dygdin á einum vælferðarsamfelagi kann metast eftir, hvussu samfelagið fer um síni sjúku og veiku. Ein grundstuðul undir føroysku vælferðini, heilsuverkið, hevur tað ikki nóg gott í løtuni.

Føroyska sjúkrahúsverkið var fyri stórum bakkasti, tá kreppan leikaði á. Nú stendur samfelagið í fagrasta blóma. Men hóast tíðirnar vendu, er alt ov lítið gjørt fyri at fáa sjúkrahúsverkið aftur á føtur.

Ein komandi landsstýrissamgonga stendur tí fyri stórum avbjóðingum. Kemur Sambandsflokkurin til valdið, verður farið miðvíst undir at fáa føroyska heilsuverkið upp á støðið hjá okkara grannalondum.

Sleppast skal undan, at deildir mugu stongja stóran part av árinum. Íløgur mugu gerast í nýggjan tólbúnað. Viðlíkahald má fremjast í sjúkrahúsverkinum. Starvsfólk skulu útbúgvast og eftirútbúgvast. Og grundaða fatanin, at føroyska heilsuverkið er eftirbátur, skal steðgast.

Við Sambandsflokkinum verður heilsuverkið tryggjað.

Sambandsflokkurin
- gott samstarv